# Ævintýraferðin aftur á ferð

**Barnaleikurin Ævintýraferðin verður partur av mongu tiltøkunum á ólavsøku í ár**

Barnaleikurin Ævintýraferðin hjá Búa E. Dam, Halli Johannessen og Dánjal D. á Neystabø verður aftur í ár framførdur á ólavsøku. Hóast heitið á leikinum í ár er tað sama, er als ikki talan um somu ævintýraferð, sum varð spæld á ólavsøku í fjør, tí søgan í leikinum er spildurnýggj.

Teir tríggir havnarmenninir hava í summar spælt barnaleikin kring landið, og seinasta vikuskiftið høvdu teir eina sera væleydnaða framførslu á G! Festivalinum.

Barnaleikurin varð eisini spældur á ólavsøku í fjør, og tá var so stórur kravgangur eftir at síggja leikin, at tað vóru mong, sum ikki fingu høvi at síggja leikin, tí allar framførslurnar vórðu útseldar. Hetta hevur havt við sær, at fyrireikararnir hava gjørt av at hava fleiri framførslur í ár.

Ævintýraferðin hjá Búa E. Dam, Halli Johannessen og Dánjal D. á Neystabø verður framførd í nýggja gula bygninginum í Kommunuskúlanum hesar dagar:

Mikudagin 27.juli kl. 16.00. Ólavsøkuaftan 28.juli kl. 15.30 og kl. 17.30. Ólavsøkudag 29.juli kl. 15.30 og kl. 17.30. Leygardagin 30. juli kl. 16.00




*Vælumtókta barnaleikurin Ævintýraferðin verður aftur í ár framførdur á ólavsøku*

# Posthúsið hjálpir teimum lesandi

Tað eru óivað mong kring landið, sum sita á nøglum og bíða eftir svarið frá útlendskum lærustovni um ólavsøkuleitið.

Vanliga er ólavsøkuaftan 28. juli dagurin, tá svarið frá donsku lærustovnunum fyriliggur. Postverk Føroya ber vanliga ikki post út ólavsøkudag, og tá postur ikki verður borin út um vikuskiftið, kunnu fólk ikki fyrr enn í fyrsta lagið mánadagin 1. august fáa svarið við postinum.

Posthúsið á Óðinshædd hevur í hesum sambandi gjørt av at hava opið tveir tímar leygardagin 30. juli, so fólk kunnu fáa sítt svar, áðrenn mánadagin. Vestanfyri húsið á Óðinshædd verður leygardagin opið millum 13 og 15 hjá fólkið, sum bíða eftir svarið frá lærustovni.

# Tarablaðið á gøtuni

TÍÐARRIT:

Enn eitt tíðarrit hevur nú sæð dagsins ljós: Tarablaðið, sum spf. Gramar við John Dalsgarð, Carl Johan Jensen og øðrum gevur út.

Í blaðnum er tilfar sum viðger politisk evni, serliga í samband við sjálvstýrisspurningin, útbúgvingarpolitikkin, millumtjóða samstarv og almennan stuðul til vinnuna.

Ein kanning frá Gallup við spurningum um tey stóru politisku málini er eisini í blaðnum. M.a. verður spurt um støðuna hjá fólki til heimildarlógirnar, miðnámsskúlan í Vági, rækjuvinnuna og útlendingapolitikkin.

Annars er blaðið á tremur við greinum um samfelagsmál og samfelagsviðurskifti. Tarablaðið fæst í størru blaðsølunum og øðrum støðum.

*sb.*



Eitt virðiligt starv

Kaupthing søkir eitt fólk til ráðgeving og kundarøkt innan fyri virðisbrævaøkið.

Tín uppgáva verður at røkja sambandið við okkara viðskiftafólk. Ein umráðandi partur av arbeiðnum er at leggja skilagóðar og lønandi ætlanir fyri teirra íløgur. Umframt at ráðgeva teimum, vit longu samstarva við, skalt tú eisini leita upp hugsandi viðskiftafólk. Vit stremba eftir varandi viðurskiftum við okkara viðskiftafólk, og tí er álit eitt lyklaorð.

Til starvið krevst, at tú ert álitisvekjandi og megnar at skapa virðing um tín persón. Tú ert útvendur og samskiftir lættliga við øll. Tú dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt, tær dámar avbjóðingar, og tú hevur lætt við at seta teg inn í nýggj viðurskifti.

Tú hevur eina hóskandi hægri útbúgving og hevur stóran áhuga fyri íløgum í virðisbrøv. Góðar arbeiðsroyndir á økinum eru ein fyrimunur, men als eingin treyt. Enskt dugir tú væl, bæði í skrift og talu.

Vit kunnu bjóða tær eitt avbjóðandi starv á fakliga høgum stigi í einum dynamiskum felagi í støðugari menning. Tú kemur at upplíva ein góðan samstarvsanda í einum spennandi og mennandi umhvørvi, har altjóða møguleikarnir eru góðir.

Lønin verður eftir avtalu. Hevur tú annars okkurt at spyrja um, ert tú vælkomin at venda tær til Peter Holm, stjóra í Kaupthing í Føroyum.

Send eina umsókn innan 15. august til:

Kaupthing
Virðisbrævamaklarafelag
Tinghúsvegur 14
Postboks 3090
FO-110 Tórshavn

Kaupthing er leiðandi innan fyri virðisbrævarøkt og vinnulánastur í Føroyum. Felagið røktar ognir fyri virki, stovnar og privatar íleggjarar og er fyrsta virðisbrævamaklarafelag í Føroyum. Kaupthing er millum 10 teir størstu bankarnar í Norðurlondum umframt deildir í London, New York, Geneve og Luksemburg. 10 fólk starvast í Kaupting í Føroyum.

KAUPTHING